# Tórshavnar Kommuna

Ársroknskapur 2005

# INNIHALDSYVIRLIT


| | Síða |
|---|---|
| Høvuðstøl | 2 |
| Undirskrift leiðslunnar | 3 |
| Grannskoðanarátekning | 4 |
| Nýttar roknskaparreglur | 5 |
| Eventualskyldur o. a. | 7 |
| Rakstrarroknskapur og gjaldføri fyri 2005 | 8 |
| Fíggjarstøða 31. desember 2005 | 10 |
| Notur til rakstrarroknskapin | 11 |
| Notur til gjaldføri | 14 |
| Notur til fíggjarstøðuna | 15 |

# HØVUÐSTØL

Í talvuni niðanfyri eru víst nøkur høvuðstøl úr roknskapunum fyri Tórshavnar Kommunu og Tórshavnar Havn fyri 2005.

Tølini niðanfyri eru í heilum túsund krónum.

| **RAKSTRARROKNSKAPUR:** | Tórs- havnar Kommuna | Tórs- havnar Havn | Til samans |
|---|---|---|---|
| Inntøkur | 478.848 | 42.436 | 521.284 |
| Rentuinntøka, netto | 201 | -1.264 | -1.063 |
| Ársúrslit | 126.823 | 15.827 | 142.650 |
| | | | |
| **FÍGGJARSTØÐA:** | | | |
| Støðisogn | 962.113 | 302.149 | 1.264.262 |
| Ogn í umferð | 198.593 | 72.094 | 270.687 |
| Skattaeftirstøður, brutto | 22.720 | - | 22.720 |
| Eginogn | 1.263.537 | 185.547 | 1.449.084 |
| Grunnar v.m. | 1.689 | - | 1.689 |
| Langfreistað skuld | 14.883 | 42.256 | 57.139 |
| Stuttfreistað skuld | 23.771 | 17.299 | 41.070 |

Talan er ikki um konsernroknskap. Tó eru millumverandi millum Tórshavnar Kommunu og Tórshavnar Havn upp á 129,2 mió.kr. mótroknað.

Víst verður til eventualskyldur og annars til roknskapirnar fyri kommununa og havnina.

# UNDIRSKRIFT LEIÐSLUNNAR

Býráðið hevur í dag viðgjørt og viðtikið ársroknskapin fyri 2005 hjá Tórshavnar Kommunu.

Vit meta, at nýttu roknskaparásetingarnar eru hóskandi, soleiðis at ársroknskapurin vísir ársins inntøkur og útreiðslur eins og ognir og skyldur hin 31. desember 2005.

Tórshavn hin 18. mai 2006

Í býráðnum:

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen<br>*formaður* | Jógvan Arge<br>*1. næstformaður* | Jan Christiansen<br>*2. næstformaður* |
| Leivur Hansen | Elin Lindenskov | Bjarti Mohr |
| Høgni Mikkelsen | Beate L. Samuelsen | Sjúrður Olsen |
| Katrin Dahl Jakobsen | Hildur Eyðunsdóttir | Annika Olsen |
| Marin Katrina Frýdal | | |

# GRANNSKOÐANARÁTEKNING

Vit hava grannskoðað ársroknskapin fyri Tórshavnar Kommunu fyri tíðarskeiðið 1. januar – 31. desember 2005.

Býráðið hevur ábyrgd av ársroknskapinum. Okkara ábyrgd er, við støði í grannskoðan okkara, at gera eina niðurstøðu um ársroknskapin.

**Framda grannskoðanin**
Vit hava fyrireikað og framt grannskoðanina í samsvari við vanliga góðkendar føroyskar grannskoðanarreglur við atliti til at fáa eina grundaða sannføring um, at ársroknskapurin ikki inniheldur týðandi feilir og manglar. Út frá eini meting um týdning og vanda hava vit undir grannskoðanini eftirkannað grundarlagið og skjalprógvið undir teimum í ársroknskapinum uppsettu upphæddum og upplýsingum annars. Í hesi hava vit tikið støðu til nýttu roknskaparreglurnar og roknskaparligu metingarnar og hava mett, um upplýsingarnar í ársroknskapinum sum heild eru nøktandi.
Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

**Niðurstøða**
Okkara fatan er, at ársroknskapurin, tá sæð verður burtur frá leiðbeining Landsstýrisins um roknskaparuppsetan, er greiddur úr hondum í samsvari við verandi krøv í føroysku lóggávuni og reglunum, og at ársroknskapurin lýsir ársins inntøkur og útreiðslur, eins og ogn og skyldur hin 31. desember 2005.

**Supplerandi upplýsingar**
Undir umrøðuni av nýttum roknskaparreglum verður upplýst, at roknskapurin ikki er uppsettur eftir teimum reglum, sum Føroya Landsstýri hevur sett í serligari leiðbeining. Okkum er upplýst, at kommunan sendir serliga uppgerð, sum lýkur ásettu reglurnar, til Føroya Landsstýri. Eisini er upplýst, at avskrivað verður bert upp á rakstrartól, og at eingin avskrivingarætlan er gjørd fyri avskriving av húsum kommununnar og øðrum ognum.

Tórshavn hin 18. mai 2006

SPEKT statsaut. revisorar Sp/f

| | |
|---|---|
| Mirjam Haraldsen<br>*statsaut. revisor* | Hjalmar Klein Olsen<br>*grannskoðari* |

# NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

Ársroknskapurin fyri 2005 er gjørdur eftir somu roknskaparreglum sum undanfarna ár.

Ársroknskapurin er uppsettur eftir sama sniði sum undanfarna ár og ikki eftir serligu leiðbeiningini frá Føroya Landsstýri um roknskaparuppstilling av kommunuroknskapum.

**Tórshavnar Havn**

Tórshavnar Havn hevur egið bókhald og setir upp egnan ársroknskap. Tølini fyri Tórshavnar Havn eru tikin við í roknskapin á tann hátt, at nettoúrslitið er rakstrarført í roknskapinum, eins og ogn, skuld og eginpeningur eru sett upp við nettotølum. Millumverandi millum kommununa og havnina, ið eru upptikin ávikavist sum ogn og skuld, ganga út í móti hvørjum øðrum.

**Inntøkur**

Húsaleiga og aðrar inntøkur verða inntøkuførdar, tá rokning verður send.

Skattainntøkurnar verða tíðargreinaðar til roknskaparárið.

Broytingar í skattaálíkningum fyri undanfarin ár, verða rakstrarførdar undir "Serligar upphæddir".

**Kostnaður**

Kostnaður verður tikin við so hvørt, sum rokningarnar koma til kommununa.

Kommuna nýtir eina blokkskipan til flest allar deildir og stovnar hjá kommununi.

**Rentur**

Bæði rentuinntøkur og rentuútreiðslur eru tíðargreinaðar til 31. desember 2005.

**Avskrivingar**

Avskrivað verður ikki upp á materiellu støðisognina. Tó verða maskinur og amboð avskrivað við 25% av saldu. Harafturat verður íløgan í vegir, kloakk, vatn o.a. avskrivað í sama ári íløgan verður gjørd.

# NÝTTAR ROKNSKAPARREGLUR

**Serligar upphæddir**
Serligar upphæddir eru sundurgreinaðar í notu 9. Upphæddirnar fevna um skattabroytingar viðvíkjandi undanfarnum árum og aðrar serligar upphæddir í árinum.

**Fíggjarlig støðisogn**
Innskot í SEV upp á 1.093 tkr. og partabrøv í P/F Fjarhitafelagnum upp á 250 tkr. eru upptikin til áljóðandi virði uttan mun til innara virðið. Nevnast kann, at sambært ársroknskapinum fyri 2005 fyri SEV er kommununnar partur av eginognini hjá SEV 131.738 tkr.

**Støðisognir**
Ognirnar eru virðissettar við støði í útveganarvirðinum. Undantikið upphæddini fyri vegir, kloakk, vatn o.a., og fyri maskinur og amboð, er eingin avskrivingarætlan gjørd. Sí annars omanfyri undir avskrivingum.

**Virðisbrøv**
Virðisbrøv verða virðissett til kursvirði við roknskaparárslok.

**Skattaeftirstøður**
Skattaáogn er upptikin út frá upplýsingum frá Toll- og Skattstovu Føroya. Avsett er í móti væntaðum tapi.

**Framfluttar játtanir**
Fyri ávísar stovnar og deildir hjá kommununi verða ikki brúktar játtanir ella møgulig meirnýtsla fluttar fram til næsta ár. Upphæddin verður rakstrarførd undir serligum upphæddum, og sett upp undir eginognini.

**Gjaldførisyvirlit**
Gjaldførisyvirlitið fyri kommununa er gjørt við støði í broytingunum ímillum primo og ultimo-postarnar í fíggjarstøðuni. Tøkur peningur hjá Tórshavnar Havn er lagdur afturat gjaldførinum hjá kommununi við árslok, soleiðis at samlaða gjaldførið framkemur.

# EVENTUALSKYLDUR O. A.

**Ravmagnsfelagið SEV**
Fyri Ravmagnsfelagið SEV borgar kommunan saman við hinum limakommununum ein fyri allar, allar fyri eina og sínámillum í mun til íbúgvaratalið fyri tær árligu útreiðslurnar til rentur og avdráttir av virkislánum felagsins og aðrar útreiðslur, íroknað møguligt rakstrarhall.

**Hoyvíkshagi Suður**
Í sambandi við útstykkingarnar í Hoyvíkshaga Suður, hevur kommunan bundið seg til stykkir til almenn endamál, t.e. dagstovnar, og til víðarisølu fyri til samans 14.765 tkr. Upphæddin verður javnað tá ið endaligur kostnaður fyri útstykkingina fyriliggur.

**Játtanir yvir fleiri ár**
Kommunan hevur bundið seg til einar 17.105 tkr. til ymsar studningar v.m. yvir næstu 3-5 árini.

# AÐRAR UPPLÝSINGAR

**Tórshavnar Havn**
Sum nevnt frammanfyri er roknskapurin hjá Tórshavnar Havn ikki uppsettur eftir nýggju kunngerðini frá Føroya Landsstýri. Roknskapartølini fyri Tórshavnar Havn eru tikin við í ársroknskapinum hjá Kommununi við einum tali í rakstrinum, gjaldførinum, ognunum, skuldini og eginognini. Kommunan eigur havnina og ábyrgdast sostatt fyri øllum skyldum hjá Tórshavnar Havn.

Ársroknskapurin hjá Tórshavnar Havn fyri 2005 er vístur frammanfyri í høvuðstølum. Víst verður eisini til ársroknskapin fyri Tórshavnar Havn.

# RAKSTRARROKNSKAPUR OG GJALDFØRI FYRI 2005

| Nota | tkr. | Rokn-skapur 2005 | Fíggjar-ætlan 2005 | Rokn-skapur 2004 |
|---|---|---|---|---|
| 1 | **Inntøkur** | **478.848** | **456.713** | **459.924** |
| | **Útreiðslur** | | | |
| 2 | Fyrisitingarútreiðslur | 41.544 | 42.490 | 37.326 |
| 3 | Tekniskar veitingar | 83.040 | 80.242 | 76.754 |
| 4 | Skúlamál | 40.677 | 41.492 | 45.039 |
| 5 | Mentamál | 22.570 | 27.185 | 19.874 |
| | Barnaansing | 100.771 | 104.334 | 89.980 |
| 6 | Sosial- og heilsumál | 22.323 | 22.488 | 22.082 |
| 7 | Aðrar útreiðslur | 35.103 | 35.723 | 16.585 |
| | | **-346.028** | **-353.954** | **-307.640** |
| | **Úrslit áðrenn rentur** | **132.820** | **102.759** | **152.284** |
| 8 | Rentuinntøkur, netto | 201 | 136 | 419 |
| | **Úrslit áðrenn avskrivingar** | **133.021** | **102.895** | **152.703** |
| | Avskrivingar | -27.926 | 0 | -34.275 |
| | **Úrslit áðrenn serligar upphæddir** | **105.095** | **102.895** | **118.428** |
| 9 | Serligar upphæddir, netto | 21.728 | 0 | 8.288 |
| | **Úrslit at flyta til eginogn** | **126.823** | **102.895** | **126.716** |
| | Nettoúrslit, Tórshavnar Havn | 15.827 | - | 9.899 |
| | **Samlað úrslit áðrenn avdráttir og íløgur** | **142.650** | **102.895** | **136.615** |

Tølini omanfyri fevna bert um Tórshavnar Kommunu. Tølini fyri Tórshavnar Havn eru víst serskilt niðast í yvirlitinum. Víst verður til ársroknskapin fyri Tórshavnar Havn.

# RAKSTRARROKNSKAPUR OG GJALDFØRI FYRI 2005

| | tkr. | Rokn-skapur 2005 | Fíggjar-ætlan 2005 | Rokn-skapur 2004 |
|---|---|---|---|---|
| | **GJALDFØRI FYRI 2005** | | | |
| | **Úrslit hjá kommununi** | **126.823** | **102.895** | **126.716** |
| | Javningar uttan gjaldførisávirkan | 14.922 | - | 43.890 |
| | Lán til Tórshavnar Havn | -10.100 | -10.100 | -10.400 |
| | **Gjaldføri frá rakstri kommununnar** | **131.645** | **92.795** | **160.206** |
| 10 | Íløgur | -114.473 | -179.301 | -116.078 |
| | Nýútveganir | -6.793 | -5.982 | -8.395 |
| | Fíggjarlig støðisogn | 21.789 | 0 | 0 |
| | Útvegan av virðisbrøvum | -42.287 | 0 | -1.628 |
| | Avdráttir av lánum | -1.563 | -1.834 | -5.158 |
| | Broyting í skuldarum, skattaeftirstøðum v.m. | -13.160 | - | -8.473 |
| | Broyting í ognarum v.m. | 83 | - | -15.811 |
| | **Broyting í gjaldføri gjøgnum árið** | **-24.759** | **-94.322** | **4.663** |
| | Gjaldføri, primo | 50.494 | - | 45.831 |
| | **Gjaldføri ultimo, kommunan** | **25.735** | **-** | **50.494** |
| | Gjaldføri ultimo, Tórshavnar Havn | 62.953 | **-** | 44.414 |
| | **Samlað gjaldføri, ultimo 2005** | **88.688** | **-** | **94.908** |

Víst verður til notu 21, har tað framgongur, at kommunan hevur játtaðar, men ikki brúktar útreiðslur og íløgur fyri til samans 83.042 tkr.

# FÍGGJARSTØÐA HIN 31. DESEMBER 2005

| Nota | tkr. | 31/12 2005 | 31/12 2004 |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| | Tøkur peningur | 25.735 | 50.493 |
| | Virðisbrøv | 73.908 | 31.621 |
| 11 | Aðrar ognir í umferð | 98.950 | 86.701 |
| 12 | Fíggjarlig støðisogn | 3.843 | 25.632 |
| 13, 14 | Materiell støðisogn | 962.113 | 867.478 |
| 15 | Skattaeftirstøður | 10.120 | 9.209 |
| 16 | Ogn, Tórshavnar Havn | 374.243 | 360.200 |
| | **OGN TIL SAMANS** | **1.548.912** | **1.431.334** |
| | **SKYLDUR** | | |
| | **Skuld** | | |
| 17 | Stuttfreistað skuld | 23.771 | 25.282 |
| | Lán | 14.883 | 16.447 |
| 18 | Skuld, Tórshavnar Havn | 59.485 | 69.719 |
| | **Skuld til samans** | **98.139** | **111.448** |
| | **Avsetingar v.m.** | | |
| 19 | Grunnar til ávís endamál v.m. | 1.689 | 95 |
| | **Avsetingar til samans** | **1.689** | **95** |
| | **Eginogn** | | |
| 20 | Eginogn, Tórshavnar Kommuna | 1.263.537 | 1.150.071 |
| | Eginogn, Tórshavnar Havn | 185.547 | 169.720 |
| | **Eginogn til samans** | **1.449.084** | **1.319.791** |
| | **SKYLDUR** | **1.548.912** | **1.431.334** |
| 21 | Ikki nýtt játtan | | |

# NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN

| | tkr. | Rokn-skapur 2005 | Fíggjar-ætlan 2005 | Rokn-skapur 2004 |
|---|---|---|---|---|
| 1 | **Inntøkur** | | | |
| | Inntøka av traðum og økjum | -2.603 | 2.000 | -640 |
| | A- og B-skattur | 448.037 | 432.213 | 430.835 |
| | P/F-skattur | 33.414 | 22.500 | 29.729 |
| | | **478.848** | **456.713** | **459.924** |
| 2 | **Fyrisitingarútreiðslur** | | | |
| | Miðfyrisitingin | 16.519 | 17.283 | 14.359 |
| | Trivnaðarfyrisitingin | 6.037 | 6.106 | 5.832 |
| | Tekniska fyrisitingin | 12.937 | 12.916 | 11.873 |
| | Edv-deildin | 4.264 | 4.250 | 3.644 |
| | Kommunala skattakærunevndin | 1.787 | 1.935 | 1.618 |
| | | **41.544** | **42.490** | **37.326** |
| 3 | **Tekniskar veitingar** | | | |
| | Vegir, gøtur, reinhald o.a. | 15.373 | 12.995 | 14.058 |
| | Vatnveitingin og gøtuljós | 11.804 | 11.822 | 10.129 |
| | Renovatiónin | 15.542 | 18.176 | 12.681 |
| | Asfalt, ferðsla og grótbrot | 15.549 | 11.121 | 16.563 |
| | Bussleiðin | 8.993 | 8.761 | 8.887 |
| | Sløkkiliðið | 7.837 | 10.507 | 6.272 |
| | Fríðkan og kirkjugarðar | 7.942 | 6.860 | 8.164 |
| | | **83.040** | **80.242** | **76.754** |

# NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN

| | tkr. | Rokn-skapur 2005 | Fíggjar-ætlan 2005 | Rokn-skapur 2004 |
|---|---|---|---|---|
| 4 | **Skúlamál** | | | |
| | Kollafjarðar skúli | 2.020 | 1.914 | 1.793 |
| | Tórshavnar Kommunuskúli | 4.756 | 5.421 | 5.411 |
| | Venjingarskúlin | 3.900 | 4.137 | 4.317 |
| | Eysturskúlin | 4.686 | 4.987 | 7.813 |
| | Sankta Frans Skúli | 3.110 | 3.383 | 4.447 |
| | Skúlin í Hoyvík | 3.122 | 3.083 | 3.289 |
| | Hoyvíkshøllin | 320 | 350 | 437 |
| | Argja Skúli | 3.656 | 3.651 | 4.442 |
| | Kvøld- og Ungdómsskúlin | 4.049 | 4.105 | 4.517 |
| | Tórshavnar Musikkskúli | 5.688 | 5.072 | 4.452 |
| | Kaldbaks skúli | 422 | 490 | 307 |
| | Skúlin í Hesti | 91 | 265 | 0 |
| | Nólsoyar Skúli | 613 | 449 | 0 |
| | Velbastaðar Skúli | 884 | 800 | 0 |
| | Felags skúlamál | 3.360 | 3.385 | 3.814 |
| | | **40.677** | **41.492** | **45.039** |
| 5 | **Mentamál** | | | |
| | Tórshavnar Býarsavn | 1.114 | 1.322 | 652 |
| | Býarbókasavnið | 4.234 | 4.826 | 4.253 |
| | Svimjihylurin | 5.301 | 4.192 | 5.473 |
| | Stadion | 3.845 | 3.830 | 1.068 |
| | Studningur til yms. stovnar og endamál | 5.285 | 5.437 | 4.870 |
| | Íløgustuðul til feløg v.m. | 2.791 | 7.578 | 3.558 |
| | | **22.570** | **27.185** | **19.874** |

# NOTUR TIL RAKSTRARROKNSKAPIN

| | tkr. | Rokn- skapur 2005 | Fíggjar- ætlan 2005 | Rokn- skapur 2004 |
|---|---|---|---|---|
| 6 | **Sosial- og heilsumál** | | | |
| | Sosial umsorgan og forsorg | 8.882 | 8.615 | 9.886 |
| | Lækna- og heilsumál | 3.628 | 3.720 | 3.524 |
| | Skúlatannlæknastovan | 9.045 | 9.383 | 7.820 |
| | Serflutningsskipanin | 253 | 325 | 316 |
| | Sambýlið í Hoydølum | 515 | 445 | 536 |
| | | **22.323** | **22.488** | **22.082** |
| 7 | **Aðrar útreiðslur** | | | |
| | Ymiskar aðrar útreiðslur | 8.460 | 8.761 | 8.441 |
| | Sethús kommununnar | 338 | 1.055 | 253 |
| | Onnur hús kommununnar | 26.305 | 21.993 | 7.891 |
| | Reguleringskonta | 0 | 3.914 | 0 |
| | | **35.103** | **35.723** | **16.585** |
| 8 | **Rentur, netto** | | | |
| | Rentuinntøkur, peningastovnar | 429 | 2.000 | 977 |
| | Rentuinntøkur, aðrar | 988 | 0 | 565 |
| | Fíggjarinntøkur, virðisbrøv, netto | 1.192 | 0 | 1.510 |
| | Rentuútreiðslur, lán | -2.145 | -1.864 | -2.401 |
| | Rentuútreiðslur, kassakredittir | -263 | 0 | -232 |
| | | **201** | **136** | **419** |
| 9 | **Serligar upphæddir** | | | |
| | Broytingar í skatti viðv. eldri árum, netto | -18.790 | 0 | -19.997 |
| | Tap upp á skuldarar, netto | -50 | 0 | 2.624 |
| | Framflutt játtan, netto | -1.544 | 0 | 11.337 |
| | Aðrar inntøkur og útreiðslur, netto | -1.344 | 0 | -2.252 |
| | | **-21.728** | **0** | **-8.288** |

# NOTUR TIL GJALDFØRI

| | tkr. | Rokn-skapur 2005 | Fíggjar-ætlan 2005 | Rokn-skapur 2004 |
|---|---|---|---|---|
| **10** | **Íløgur** | | | |
| | Byggibúning, útstykkingar o.a. | 0 | - | 0 |
| | Útlegg í sambandi við útstykkingar o.t. | 11.005 | - | 16.394 |
| | Vegir | 19.344 | - | 19.237 |
| | Renovatión | 19.207 | - | 1.620 |
| | Sløkkiliðið | 0 | - | 3.220 |
| | Kirkjugarðar | 0 | - | 2.913 |
| | Fríðkan av býnum | 0 | - | 1.327 |
| | Ítróttur og frítíðarvirksemi | 7.889 | - | 8.879 |
| | Barnaansing | 11.898 | - | 41.970 |
| | Skúlar | 23.485 | - | 11.194 |
| | Eldrarøkt | 18.709 | - | 9.324 |
| | Umsitingin | 2.132 | - | 0 |
| | Annað | 804 | - | 0 |
| | | **114.473** | **179.301** | **116.078** |

# NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA

| | tkr. | 31/12 2005 | 31/12 2004 |
|---|---|---|---|
| 11 | **Aðrar ognir í umferð** | | |
| | Skuldarar og onnur áogn | 33.832 | 28.294 |
| | Vørugoymslur | 1.201 | 1.356 |
| | Mvg | 12.226 | 10.958 |
| | Skattaavrokning fyri desember | 51.691 | 46.093 |
| | | **98.950** | **86.701** |
| 12 | **Fíggjarlig støðisogn** | | |
| | Kreppulánsgrunnurin | 0 | 21.858 |
| | Virðisskjøl | 3.843 | 3.774 |
| | Tórshavnar Havn | 129.211 | 120.761 |
| | | **133.054** | **146.393** |
| | Áogn hjá Tórshavnar Havn | -129.211 | -120.761 |
| | | **3.843** | **25.632** |
| 13 | **Materiell støðisogn** | | |
| | Hús kommununar | 615.569 | 533.929 |
| | Økir, traðir o.a. | 55.047 | 53.165 |
| | Aðrar ognir | 27.018 | 26.831 |
| | Maskinur og amboð | 24.188 | 24.267 |
| | Útlegg í sambandi við útstykkingar o.t. | 31.850 | 20.845 |
| | | **753.672** | **659.037** |
| 14 | **Vegir, kloakkir, vatn o.a.** | | |
| | Íløga við ársbyrjan | 540.211 | 514.025 |
| | Tilgongd í árinum | 19.766 | 26.186 |
| | | **559.977** | **540.211** |
| | Áður avskrivað | -331.770 | -305.584 |
| | Avskrivað í árinum | -19.766 | -26.186 |
| | | **208.441** | **208.441** |

# NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA

| | tkr. | 31/12 2005 | 31/12 2004 |
|---|---|---|---|
| **15** | **Skattaeftirstøður** | | |
| | Persónsskattur | 18.924 | 18.062 |
| | Partafelagsskattur | 3.796 | 3.747 |
| | Avsett viðv. skattaeftirstøðum | -12.600 | -12.600 |
| | | **10.120** | **9.209** |
| **16** | **Ogn, Tórshavnar Havn** | | |
| | Materiell støðisogn | 302.149 | 304.150 |
| | Áogn | 9.141 | 11.636 |
| | Tøkur peningur | 62.953 | 44.414 |
| | | **374.243** | **360.200** |
| **17** | **Stuttfreistað skuld** | | |
| | Kassakredittir | 712 | 311 |
| | Ognarar og onnur skuld | 23.059 | 24.971 |
| | | **23.771** | **25.282** |
| **18** | **Skuld, Tórshavnar Havn** | | |
| | Langfreistað skuld | 171.467 | 171.467 |
| | Skuld til Tórshavnar Kommunu | -129.211 | -120.761 |
| | | **42.256** | **50.706** |
| | Stuttfreistað skuld | 17.229 | 19.013 |
| | **Netto skuld** | **59.485** | **69.719** |

# NOTUR TIL FÍGGJARSTØÐUNA

| | tkr. | 31/12 2005 | 31/12 2004 |
|---|---|---|---|
| 19 | **Grunnar til ávís endamál v.m.** | | |
| | Deposita | 1.689 | 95 |
| | Grunnur til rennibreyt | 3.013 | 3.005 |
| | Grunnur til rennibreyt, innistandandi | -3.013 | -3.005 |
| | | **1.689** | **95** |
| 20 | **Eginogn** | | |
| | **Framfluttar játtanir** | **83.042** | **84.586** |
| | **Kapitalkonta** | | |
| | Salda primo | 1.065.485 | 936.546 |
| | Javning viðvíkjandi primo, annað | 72 | -123 |
| | Eginognin í Vøggustovuni og Barnagarðinum við Velbastavegin | 0 | 2.346 |
| | Eginogn, Nólsoyar Kommuna | -5.153 | 0 |
| | Eginogn, Kirkjubøar Kommuna | -6.732 | |
| | Flutt frá rakstri | 126.823 | 126.716 |
| | | **1.180.495** | **1.065.485** |
| | **Eginogn til samans** | **1.263.537** | **1.150.071** |

**21 Ikki nýtt játtan**

Við árslok 2005 eru bókaðar 83.042 tkr. sum framflutt játtan. Av hesum viðvíkja 16.698 tkr. ikki nýttum blokkum, meðan 66.344 tkr. viðvíkja framfluttum íløgum. Í notu 9 er munurin millum framflutta játtan við ársbyrjan og við árslok inntøkuførdur við 1.544 tkr.